# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Hans Elmar Poulsen 70 ár



Í morgin, 28 februar, fyllir Hans Elmar Poulsen 70 ár.

Hans Elmar er føddur og uppvaksin við Ljósá. Sonur Sofus og Poulinu og er yngstur av trimum brøðrum. Hann fekk tíðliga at kenna lívsins harða veruleika, tá ið hann sum 12 ára gamal misti pápa sín, sum doyði av tuberklum. Av tí at teir eldru brøðurnir, Pól Jóhannus og Andrias, vóru vorðnir so mikið vaksnir, at teir vóru farnir til skips, var hann einsamallur eftir heima saman við mammu sínari og mátti tískil taka sær av hoygging og at skera torv.

Hann gekk í skúla á Eiði í fimm ár, og tað er øll skúlagongdin hann hevur, umframt at hava tikið koyrikort. Men væl hevur hilnast.

Hann fór til skips sum 14 ára gamal og var á sjónum í 10 ár við ymiskum sluppum. "Tað var í teirri tíðini, tá ið skipini vóru av træ, og mennirnir av stál", sum hann plagar at taka til. Í tvey ár var hann við hvalabátinum Sumba. Tað var ein spennandi tíð, sum honum dámar væl at siga frá.

Hann bleiv giftur við Kirstin Nielsen, dóttir Doru og Dánjal Nielsen úr Vatnsoyrum í 1961. Tey búsettust í Tórshavn. Hann arbeiddi á tunnuvirkinum í fleiri ár, tað var í sildatíðini. Nógvar tunnur skuldu leverast, so har varð arbeitt akkord, og tað vóru langir dagar.

Í 1965 fór hann til Vatnsoyrar at hjálpa verðfaðir sínum, Dánjal Nielsen og øðrum, at byggja Zarepta. Meiningin var helst altíð at fara suður aftur til Havnar, men Dánjal hevði nógv kei- og dykkaraarbeiði at gera og bað hann Hans Elmar vera formann í arbeiðinum at gera keiina í Sørvági lidna, meðan hann sjálvur dykkaði arðastani. Tískil bleivu tey verandi í Vatnsoyrum.

Dánjal átti eitt lítið verkstað á Vatnsoyrum, sum Elmar keypti í 1970 og byrjaði fyri seg sjálvan. Hann smíðaði køkar, hurðar, vindeygu og onkrar trappur. Væl mundi handverkið verða greitt úr hondum, hóast hann ikki hevði lært til handverkara, tí hann hevði nokk at gera.

Í 1972 fekk hann tað fyrsta Husmorvindeyga úr Noregi. Hetta var tað rætta vindeygað til røttu tíð til føroyska marknaðin. Tey gingu sum heitt breyð. Sendingarnar, sum hann ordraði úr Noregi, gjørdust størri og størri og tann eina sendingin í 1971 var upp á heili 600 vindeygu. Sum føroyingum líkt, so vildu fleiri handilsmenn hava part av pylsuni, og sølan minkaði. Elmar dugdi at síggja, at einasti møguleiki var at fáa einarætt upp á at framleiða vindeyguni í Føroyum. Hetta varð játtað honum av tí, at norski patenthavarin sá, hvussu stóran marknaðarpart Elemar hevði fingið í Føroyum.

Hann byrjaði so at framleiða tað so vælkenda H-vindeygað í 1975. Við tað at hann kundi framleiða vindeyguni fyri lægri prís, enn tey kundu flytast inn fyri úr Noregi, gekk ikki long tíð, til konkurentarnir fóru at keypa vindeyguni frá Hans Elmari.

Í 1975 fór hann í gongd við at byggja eina stóra høll til vindeygaframleiðsluna, og hevði hann sostatt tað størsta snikkaravirkið í landinum og framleiddi heili 11.000 vindeygu í 1988. Í 1993 varð Vatnsoyra Snikkaravirki heiðrað av A/S Spilka í Noregi, sum átti patentið uppá H-vindeygað, fyri at hava heimsins størsta marknaðarpart.

Hans Elmar hevur altíð havt stóran áhuga í bátum. Í 1986 byrjaði hann saman við synunum at framleiða 33'föts AquaStar glastrevjabátar í Sørvági. Hesir vóru sera vælegnaðir til føroyskan útróður. Hendan framleiðslan helt uppat í 1989, men HE gavst ikki á hondum. Árið eftir byrjaði hann rútaframleiðslu í hesum bygninginum. Henda framleiðslan helt fram í 10 ár. Í 1990 keypti hann eisini Føroya Glugga í Miðvági, sum síðani tá hevur framleitt hurðar og H-vindeygu úr PVC.

Hann er nokk mest kendur sum vindeygaframleiðari. Ikki einans tí at tað gekk væl í sjeyti- og áttatiárunum, men eisini tí at virkið hóraði undan kreppuni í nítiárunum. Tá ið kreppan var av, dugdi hann at lata dreingirnar, sum arbeiddu á virkinum, taka yvir. Teir hava síðani rikið virkið fram til í fjør heyst, táið virkið, sum nú eitur HDYGD, varð selt. Hetta var ein stór avgerð, sum Hans Elmar var við uppá. Hann hevur altíð verið skjótur at tikið avgerðir. Eisini er hann vorðin kendur fyri sínar gomlu bilar, sum hann hevur hugnað sær við seinnu árini.

Her er, í stuttum, greitt frá lívsverkinum hjá pápa. Pápi arbeiddi rættuliga nógv og langar dagar. Byrjaði áðrenn vit vóru uppi á morgni, og hóast hann framvegis arbeiddi, tá vit fóru í songar, so kunnu vit tó við taksemi minnast aftur á góð og trygg barnaár. Vit høvdu tann framíhjárætt at mamma var heima hjá okkum børnum, og feriurnar vórðu nýttar til at ferðast saman.

Vit eru seks systkin, tríggir beiggjar og tríggjar systrar. Abbabørnini eru 20, 10 gentur og 10 dreingir. Dorit, sum er elst, er gift við Simon Marshall. Tey eiga 2 børn og búgva í Onglandi. Sofus er giftur við Mariann Steinberg, uppvaksin í Grønlandi. Tey eiga trý børn og búgva í Vatnsoyrum. Dánjal Pauli er giftur við Majbritt Garðalíð úr Vestmanna. Tey eiga fýra børn og búgva í Vatnsoyrum. Heðin er giftur við Marjun Holm-Jacobsen úr Havn. Tey eiga fimm børn og búgva í Vatnsoyrum. Guðrun er gift við Stig Elttør úr Klaksvík. Tey eiga trý børn og búgva í Klaksvík. Katrin er gift við Júst Vang úr Havn. Tey eiga trý børn og búgva í Havn.

Tað kundi verið mangt at nevnt, sum vit upplivdu saman við pápa okkara, sum børn og fram til dagin í dag. Allar túrarnar runt Føroya land við bátinum, túrarnar í haganum og ikki minst túrarnar í summarhúsinum í DK. Vit kunnu við takksemi minnast aftur á okkara barnaár og alt tað sum vit gjørdu saman. Mamma og pápi hava givið okkum tað bestu gávuna, sum foreldur kunnu geva børnum sínum. Tey hava lært okkum um tann Harra Jesus, sum tey sjálvi lærdu at kenna á barnaárum.

Góði pápi, vit ynskja tær hjartaliga tilukku við 70 ára degnum og takka fyri alt, sum tú hevur verið fyri okkum við ynskjum um nógv góð ár framyvir.

**Kærar heilsur**
**Børnini við familjum**



*Sjálvsmynd av S.J. Mykines*

# Framsýning við eldri listaverkum

Hesa vikuna hevur Listagluggin, Niels Finsensgøta 25, eina blandaða framsýning við í høvuðsheitum eldri listaverkum.

Á søluframsýningini eru listaverk eftir Jógvan Waagstein, Kruse, S.J. Mykines, Bent Restorff, Elinborg Lützen, Janus Kamban, Jack Kampmann, Ingálv. av Reyni, Eyðun av Reyni, Wiliiam Heinesen, Zacharias Heinesen, Tórbjørn Olsen, Kári Svensson, Bárður Jákupsson, Olivur við Neyst, Amariel Norðoy, Hanni Bjartalíð, Frimod Joensen og fleiri - umleið 50 listaverk.

Listaframsýningin er sera fjølbroytt við nógvum merkisverdum listaverkum. T.d. eru fleiri sera góð, bæði minni og størri verk eftir Waagstein, sjálvsmynd av S.J. Mykines og Tórbjørn Olsen, andlitsmyndir av Kruse og ein stórur málningur, ein altartalva, eftir K.Svensson.

Framsýningin er opin alla vikuna og endar leygardagin. Opið er týsdag – fríggjadag frá 15-17.30 og leygardag frá kl. 11-14.



Lesið Sosialin - so eru tit við